# Gloyma beltini

Kanningar, sum danska løgreglan gjørdi nærhendis skúlunum, tá skúlarnir byrjaðu aftur, vístu, at nógv foreldur koyra ov skjótt, og at tað gloyma trygdarbeltið hjá sær sjálvum og børnunum. Kanningarnar, sum vardu átta dagar, staðfestu ikki færri enn 8.647 brot á ferðslulógina, og tað er meiri enn í teimum tilsvarandi kanningunum í fjør. Í 284 førum høvdu foreldrini gloymt at seta børnini í trygdarbelti, og í 1.306 førum høvdu foreldrini gloymt síni egnu trygdarbelti. Ferðin var kortini tann størsti trupulleikin. 6.256 bilar koyrdu skjótari, enn loyvt var, skrivar Ritzau.



# Riva fekk flogfar at venda

Eitt flogfar hjá íslendska flogfelagnum Icelandair noyddist at venda aftur, tá tað var á veg frá altjóða flogvøllinum í Keflavík til Oslo gjáramorgunin, tí ein riva var komin í tað ytra lagið á einum rúti á flogfarinum. Talsmaðurin hjá Icelandair, Guðjón Arngrímssson, sigur við blaðið Vísir, at flogfarið setti seg í øllum góðum, og at ferðafólkini vórðu send til Noregs við einum øðrum flogfari løtu seinni. Sambært talsmanninum fingu ferðafólkini ikki nakran hvøkk av tilburðinum.

# Skipaeftirlit styrkjast

**- Ein hornasteinur í FAS-skipanini er Skipaeftirlitið, sum vegna veksandi uppgávur eigur at styrkjast. Tá skipatalið í FAS økist, eigur starvsfólkatalið á Skipaeftirlitinum eisini at økjast, segði Tommy Petersen, stjóri í FAS á fyrilestri í Klaksvík**

FAS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta tiltakið á Føroya Sjómannadegi í Klaksvík var mánakvøldið, tá Tommy Petersen, stjóri í FAS (Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin), helt fyrilestur í hølunum hjá Eik Banka.

Stjórin greiddi frá, hvussu skipanin sá dagsins ljós, hvat er vunnið, síðan hon kom, og hvat vit kunnu vænta okkum.

Tommy Petersen segði, at 38 skip eru í FAS-skipanini, harav 30 eru úr Føroyum, men FAS hevur eisini samskifti við fleiri ymisk reiðarí, eitt nú í Svøríki, Noregi og Danmark

- Áhugin fyri FAS er stórur, og alt bendir á, at fleiri skip flyta í hesa skipa áðrenn langt um líður.

### Skipaeftirlitið

Stjórin vísti á, at ein hornasteinur í FAS er Skipaeftirlitið, sum vegna veksandi uppgávur eigur at styrkjast. Tá skipatalið í FAS økist, eigur starvsfólkatalið á Skipaeftirlitinum eisini at økjast.

- Røkir Skipaeftirlitið ikki sínar uppgávur til fulnar og nógv skjótt, verður hetta ein beinleiðis veikleiki hjá FAS, segði Tommy Petersen.

Stjórin legði tó dent á, at Skipaeftirlitið hevur sera dugnalig fólk, men skal FAS-skipanin økjast, soleiðis sum politiskt ynski er um, er burturvið at skerja eftirlitið.

- Skipaeftirlitið og FAS eru hvør sínar skipanir, men hava eina sera umráðandi samvinnu fyri neyðini, um FAS skal hava áhuga úti í heimi. Hesin áhugi er ikki lítil eftir teimum fyrispurningum at døma, sum FAS fær.

Eitt, sum ger FAS áhugaverda hjá fremmandum brúkarum, er, at umsitingin og skipanin er lítil, og at tað tí er skjótt at fáa svar uppá ymiskar fyrispurningar.

Tá Tommy Petersen var liðugur við sína framløgu, var høvi hjá áhoyrarum at seta spurningar, og her vóru fleiri, sum bæði høvdu viðmerkingar og spurningar um FAS.

Nógv fólk, sum sigla undir FAS-skipanini og undir øðrum líknandi skipanum, vóru og lýddu á.

### Vakti ans

Leggjast kann aftrat, at listarliga framsýningin hjá Hans Jacob Fuglø av modelsluppunum vakti ans í nýggja og snotiliga bygninginum hjá Eik Banka í Klaksvík.



*Tommy Petersen á fyrilestri í Klaksvík* *Mynd: Dávur Winther*



*Ein sera væl nøgdur fyriskipari, Niklas Heri Jákupson, sum legði øll kappingarúrslitini út so hvørt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sera væl nøgdir fyriskiparar

**- Vit læra betri og betri at fyriskipa dagin, og í dag koyrdi alt veruliga eftir skinnarum. Tiltøkini eru eisini vorðin betri og betri, sigur Niklas Heri Jákupson, sum er ein av fyriskiparunum av Føroya Sjómannadegi**

SJÓMANNADAGUR
*Óla Jákup Jacobsen*

Tá leygarkvøldið leið í Klaksvík, fingu vit orð á ein av fyriskiparunum av sjómannadegnum, Niklas Hera Jákupson.

- Dagurin hevur eydnast fantastiska væl. Veðrið hevur víst seg frá síni bestu síðu, og her hava verið ótrúliga nógv fólk, sigur ein sera vælnøgdur Niklas Heri.

Hann vísir á, at hetta er fimmta árið, at skipað verður fyri sjómannadegi, og fyrireikararnir føla, at teir hava lært betri og betri at fyriskipa dagin, og í dag eru teir samdir um, at alt veruliga koyrdi eftir skinnarum. Tiltøkini eru eisini vorðin betri og betri.

### Góðir stuðlar

- Vinnan eigur henda dagin. Alt er ókeypis, øll tiltøk og øll starvsfólk arbeiða frítt. Haraftrat hava vit havt sera góðar vinningar til tær ymsu kappingarnar. Við einum slíkum degi fylgja tí ótrúliga nógvar útreiðslur, sum allar eru dekkaðar av stuðlum frá vinnuni sjálvari. Annars hevði tiltakið als ikki latið seg gjørt, sigur Niklas Heri.

Hann letur ongan iva vera um, at hesin dagur er ómetaliga umráðandi fyri Klaksvíkina, tí Klaksvík er okkara høvuðsfiskibýur, sum hann tekur til.

- Sjómannadagurin er komin fyri at vera og verður hildin aftur næsta ár, vissar Niklas Heri Jákupson okkum um.

Lesið eisini greinarnar á blaðsíðu 12 og 13.

# Sjómanskonur vístu sínar dygdir

**- Framsýningin umborð á Ågot hevur verið heilt ótrúliga væl vitjað. Tað hevur verið ein støðugur streymur av fólki alla tíðina, siga tvær glaðar og væl nøgdar listakvinnur og sjómannakonur**

SJÓMANNADAGUR
*Óla Jákup Jacobsen*

Sjómannadagurin var ikki einans fyri sjálvar sjómenninar. Umborð á nýumvældað skipinum Ågot hingu eini 40 listaverk, sum øll vóru málað av konum til sjómenn.

Sosialurin hitti tvær av listakvinnunum, Veru Mørkøre og Siggu Petersen.

- Hetta er eitt sera væl dámt tiltak, sum hevur verið afturvendandi hesi seinastu árini, men í ár er tað fyrstu ferð, at framsýningin fer fram umborð á einum skipi. Hini árini hevur tað bara verið í einum vanligum høli.

Vera og Sigga vísa á, at orsøkin, at tær í ár endaðu umborð á Ågot, er, at eigararnir av Ågot eru í nevndini fyri sjómannadagin, og teir hava júst umvælt og snøggað Ågot til.

- Teir ringdu so til Honnu Dalsenni og hildu, at tað hevði verið stuttligt at hildið framsýningina her. Hanna ringdi so víðari til okkum aðrar sjey og samskipaði framsýningina. Samstundis var hetta eitt gott høvi at vísa skipið fram, siga tær báðar.



*Sigga Petersen og Vera Mørkøre vístu myndir fram*

### Allar sjómanskonur

- Tað serstaka við okkara framsýning er, at vit allar átta eru sjómanskonur, og vit eru allar hiðani. Eingin av okkum málar fulla tíð, men einans sum frítíðarítriv. Vit hava báðar havt framsýningar fyrr, men tær hava fyri tað mesta verið her í Klaksvík, siga Vera og Sigga.

Tær vísa á, at framsýningin umborð á Ågot hevur verið heilt ótrúliga væl vitjað.

- Meðan tær stóru kappingarnar hava verið, hevur tað verið eitt sindur minni av fólki, men annars hevur tað verið ein støðugur streymur av fólki alla tíðina, siga tvær sera glaðar og væl nøgdar listakvinnur, Vera Mørkøre og Sigga Petersen.